gult cyan magenta svart

VIÐMERKINGAR

Fra barne-oppvisningen på Nabb 2001

Jorun Simonsen

Lørdag den 31. marts var jeg til den årlige oppvisning med barn fra Havnar Fimleikarfelag.

Jeg har ikke sett noen gymnastikkopvisning i det hele tatt, siden jeg holdt opp med å undervise i Fimleikarfelagið. Derfor var jeg litt spent etter å få vite, hvordan gymnastikken har utviklet seg i de 17 årene, som er gått. Bortsett fra at det var deilig å se barna og to barnebarn også, må jeg si at det er synd, man ikke er kommet lenger i måten å tenke oppvisning på, med småbarn. Selve oppvisningen var temmelig ujevn, synes jeg.

De beste var vel alle de små, som vekslet mellem kaos og orden, ved å løpe fritt inimellom, og så få bundne oppgaver i ringene, som barna så tidlig som mulig skal overta de voksnes kjedelige vurdering av verdier, såsom evinlange utdelinger av premier og slik?

Dermed ble oppvisningen altfor lang. Man kunne kanskje også slått flere hold sammen, på det store gulvet, uten at det gjorde noe. Man ser jo helst mest på sine egne barn. Og som nevnt, gjøre noe radikalt med inn- og utmarsjerne.

Man behøver nødvendigvis ikke å gjøre tingene på samme måte, som man alltid har gjort!

Kanskje finnes det 1000 andre og bedre løsninger?

Nei, de små hadde meget af spontaniteten tilbake ennå.

Men alle de marsjene, som brølte ut av høyttalerne imellem, så høyttaleren nesten sprakk av bare ulyd, de virket ikke godt sammen med så små barn.

Det minnet meg om den verste Preussser-disiplin. Jeg trodde ikke man kunne få den uhyggefølelsen i år 2001 på »fredelige Færøyene«. Og noen av de stores stive innmarsjer, hvor tærne skulle i gulvet først, og hendene og armene oppførte seg som på tredukker. Det forsterket min sterke fornemmelse av militærdisiplin.

Og hvorfor skal 4-åringer ha svarte bukser og hvit T-shirt på? Det koster ikke mer å tenke litt i farver, og barn elsker dem.

Og hvorfor skal man bruke så lang tid på utmarsjen? Kanskje for at de skal strødd over hele gulvet.

Noen halvstore jenter hadde en serie, som det virket som om deres kropper ikke var modne til å gjøre. Det virket helt galt på meg, at de beveget seg sånn.

Jeg er også i tvivl om, hvorvidt 4-åringene hadde noe å gjøre i den trampolinen. Det finnes mindre trampettet til den aldersgruppe, hvor de får noe helt annet og riktigere utav hoppene. De var utrolig søte, etter hoppene, hvor de gav sig til og danse etter Pippi Langstrømpe-musikk på den store matten.

De som krøp på maven imellom to benker, og plutselig opdaget at hodet kunne komme opp mellem ringene, virket utrolig spontane og komiske hver gang man så et lite hode komme opp. Det var ikke noe de hadde trenet seg til på forhånd, og derfor ble det så morsomt. Og mølle, fritt på det store gulvet, etter en vellykket øvelse på matten, og små vesener, som vinket glade til foreldre og hele menneskemassen, som hadde kikket akkurat på dem.

Óføroyskt?

Dánjal J. Hansen
Offshore, Venezuela 26/3

Í Sosialinum týsdagin 20. mars, verður endurgivið frá framsøgurøðuni sum Jógvan við Keldu helt í løgtinginum í samband við fullveldisætlanina. Nógv føgur orð um frælsisneistan, sum, hóast hann hevur veri ójavnur til styrki gjøgnum tíðirnar, altíð hevur verið til og nu brennir bjartari enn nakrantíð. Við vanda fyri at gera Jógvani órætt um so er at hann ikki er rætt endurgivin, má eg siga at har er okkurt sum fær meg at ivast í hvussu bjørt glæman er hjá Jógvani sjálvum. Tað ber tó ikki til út fra blaðgreinini, at gera nakrar serligar viðmerkingar til røðuna hjá Jógvani, men tað sum ber eitt sindur uppfyri hjá mær er tað, sum hann er endurgivin fyri at siga um tiltakið, ið Unga Tjóðveldið skipaði fyri á Vaglinum herfyri. Hann kallar hesi fólkini "óføroysk" og atburð teirra "lítið virðiligan". Í Týskalandi fyri góðari hálvari øld síðan var eitt stýri, sum kallaði tey sum funnust at fyri "ótýsk". Uttan at gera fleiri samanberingar har, vildi eg ynskt at tað at kalla tey sum ein er ósamdur við fyri "óføroysk" var "óføroyskt".

Annars var upprunin til tiltakið á Vaglinum, tað lokabragd og skýmaskotavirksemi, ið sambandssinnaði vongurin í Fólkaflokkinum, sum Jógvan kanska sjalvur er eitt sindur í parti við, framdi, tá ið hann tók kvørkratak á fullveldisætlanini, hetta meðan tað besta av loysingarsinnaða vonginum, Rúna Sivertsen og Jógvan a Lækjuni, vóru á amerikuferð. At Løgmaður gjørdi av at fara til Onglands meðan djúp stjórnarkreppa var í landinum gjørdi ikki støðuna betri. Um Høgni Hoydal ikki hevði staðið so stinnur og hildi tørn til tey bæði, Rúna Sivertsen og Jógvan á Lækjuni, komu heim aftur, hevði Jógvan við Keldu ikki havt nakra framsøgurøðu hendan dagin, hetta tí fullveldisætlanin, øll sum hon var, var farin fyri bakka.

Uttan mun til um ein er samdur ella ósamdur við atfinningum og mótmælum, kann tað ikki vera "óvirðiligt", opið og alment at finnast at og mótmæla tí, sum ein heldur verða skeivt. Tað krevur dirvi at stilla seg í skotlinjuna og siga sína hugsan har sum øll kunnu hoyra, fata ella misfata orðini og venda teimum ímóti tær.

Lokabrøgd og skýmaskotavirksemi harafturímóti, tey eru óvirðilig. Eg vildi ynskt at tey eisini voru "óføroysk".

Tey flestu okkara, loysingarsinnað eins og meiri sambandssinnað, eru góð við okkara land og okkara folk. Ongin okkara er minni føroyskur enn nakar annar.

Viðari verður Jógvan við Keldu endurgivin fyri at siga at um hatta var fólki sum vit skulu taka sjálvstýrið við, so er soðið tunt í fullveldisgrýtuni. Jógvan man vita at Unga Tjóðveldið man vera naka nær kjarnan í loysingarrørsluni og at Tjóðveldisflokkurin umboðar ein fjórðapart av veljarafjøldini sambært hagtølunum hja Fynd. Hesi somu hagtøl geva Fólkaflokkinum stuðul frá minni enn einum fimtaparti av samlaðu veljarafjøldini. Harafturat er Fólkaflokkurin, sambært teimum sum sigast at hava skil fyri slíkum, býttur upp í partar og fraktiónir eftir fleiri ásum. So um bert tey sum eru samd við Jógvani eru "føroysk" og "virðilig" verdur soði av sonnum tunt, helst bara ein 5% vatnugur upploysingur.

Møguleikar

Møguleikar er yvirskriftin til oddagreinina í Sosialinum leygardagin 23. mars 2001, har greinskrivarin vísir á nakrar møguleikar fyri einari breiðari semju í fullveldistilgongdini. Greinin vísir á møguleikar fyri semjum og ørðum samgongumøguleikum, alt gott um tað. Tað sum oddagreinin hevur til felags við framsøgurøðuna hjá Jógvani við Keldu er at báðir leggja eftir Tjóðveldisflokkinum og formanni hansara fyri at hava handfari fullveldisgongdina so óstortsliga, og báðir tykjast at hava gloymt, at orsøkin til at vit hava eitt kjak í dag um fullveldi, er luttøka floksins í samgonguni og serliga íblásturin frá núverandi formanni floksins. Hugsa sær eina áheitan á Sambandsflokkin fyri trimum árum síðani um at benda kósina meira á sjálvstýrisleið fyri ikki at missa "sambandið" við politiska veruleikan!! Ørt. Men hendan leygardagin 23. Mars 2001 heitir oddagreinskrivarin á Sambandsflokkin um at gerast meira sjálvstýrissinnaðan fyri ikki at detta púra burturímillum í føroyskum politikki. Tað livandi kjak, sum í dag gongur um sjálvbjargni og sjálvræði, hevði als ikki verið til uttan tann íblástur, ið menn sum Høgni Hoydal hava givið. Sambandsflokkurin og fyri ein part Javnaðarflokkurin høvdu als ongan áhuga í evninum fyri trimum árum síðani. Í dag siga teir seg hava tey røttu svarini uppá allar ríkisrættarligar spurningar. Hví siga teir tað? Jú! teir eru kroystir av politiska veruleikanum í dag. Fyri nøkrum fáum árum síðan bannaði Edmund Joensen øllum tosi um broytingar í rísfelagsskapinum og Javnaðarflokkurin rýmdi stutt eftir úr teirri samgonguni. Sjálvstýrislógin hjá Javnaðarflokkinum hevur ligi og sivja í mølposanum síðani. Tað var Tjóðveldisflokkurin, sum í verandi samgonguskjalinum fekk lív í kjakið, og tað er treiskni Høgna Hoydals, sum ger, at vit framvegis hava eitt fullveldismál, at Javnaðarflokkurin nú at enda hevur tikið støðu til ríkisfelagsskapin og at Sambandsflokkurin kanska verður noyddur til at gera onkrar broytingar. Hevur gongdin í fullveldismálinum verið óstortslig? Tað kann gott vera. Hava mistøk verið gjørd? Onki at ivast í. Men kjakið er livandi og glæman lýsir bjart. Og tá er ikki onki landi hata helst hvønn annan og naka nógv av hatri man vera ímillum ísraelar og palestinar. Eins og so nógvir aðrir sjómenn havi eg í mínum starvi veri í nøkrum av heimsins búskaparligu skýmaskotum, har hatur millum trúðarbólkar, ættarbólkar, rík og fátøk og mótsetningar annars av ymsum slag, gera gerandisdagin hjá fólkinum sera truplan og búskaparligan og sosialan framburð ómøguligan. At tjóðveldisfólk skulu hata javnaðarfólk er reinur heilaspuni. Lat okkum nú ikki púrasta missa tamarhaldi á lutføllunum. Okkara fólk hevur tíbetur langtsíðani mist alla traditión fyri hatri og kríggi, og ongin orsøk er til at droyma okkum aftur til teir dagarnar, tá ið ósemjur vórðu avgjørdar við blankum stáli. Dialogurin fer framhaldandi at vera okkara amboð. At hann summar tíðir gerst hvassari enn væl er, mugu vit so óiva liva við.

Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin hava verið djúpt ósamdir um fullveldismálið, og nógv tjóðveldisfólk munnu hava andstygd fyri tí leikluti, ið Javnaðarflokkurin átók sær sum høvuðspapageykur hjá danska javnaðarflokkinum og donsku stjórnini.

Í hesum døgum tykist sum Javnaðar og Tjóðveldi kunnu semjast um onkur av prinsippunum I fullveldistilgongdini. Sleppir Javnaðarflokkurin papageykaleiklutinum er kanska ikki so nógv eftir av ósemjum og ósambæriligheitum. Men hatur??? Tak teg saman, maður.

Hatur

Oddagreinskrivarin í Sosialinum 23 mars heldur uppá at tjóðveldisfólk hata javnaðarfólk. Eg meini tað.

Teir ringastu fótbóltshooligans í ávikavist Manchester og Liverpool hata ivaleyst hvør annan. Teir viðgongdu protestantisku og katólsku hernaðarligu bólkarnir I Norðurír-

Stóra bringu ella lítla?

Ert tú ein av teimum 80%, ið ganga í skeivari BH-stødd?

Støkk so inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa tær at finna júst tína stødd.

Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm í ummáli, og frá AA til H skál.

Vit hava eisini korsilett í stórum støddum

siri liv & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 316610

Sosialurin - 311820

VIÐMERKINGAR

Ríkisrættarliga støða Føroya

Ása Olsen
Tórshavn

Í hesum døgum verður nógv tosað um loysing, blokkin og ta negativu hesin blokkur hevur á okkara samfelag.

Støða okkara er heilt einkult tann, at tann danska grundlógin er galdandi fyri Føroyar. Síðani hava vit heimastýrislógina og stýriskipanarlógina.

Í heimastýrislógini er tað nakað, ið verður kallað A og B mál, og er hettar mál, ið ávikavist eru yvirtikin ella kunnu yvirtakast og mál, ið ikki kunnu yvirtakast.

Tá vit yvirtaka eitt mál, merkir tað, at danska stjórnin útdeligerar viðkomandi mál til okkum at umsita, og fyri at fíggja hesa umsiting, fylgir ein upphædd við (blokkurin).

Í 1998 varð fyrispurningur settur fram til ríkisumboðið, fyri at vita, um okkara yvirtøka av undirgrundini eisini var ein deligatión, og varð svarið ja.

Hvat merkir hettar, og hvønn týdning hevur tað fyri okkum?

So leingi vit eru í tí ríkisrættarligu støðu við Danmark vit eru í dag, so kann danska stjórnin til eina og hvørja tíð fara inn og annulera alt, ið eitur delegatión soleiðis, at vit eru í somu støðu sum eitthvørt amt í Danmark.

Eitt ið undrar meg er, at tá fólk byrja at tosa um loysing og sjálvstýri, so er tað næstan ongin, ið tosar um hesi viðurskiftir, men tosið snýr seg bert um, áramálið fyri, hvussu leingi vit fáa blokkin.

Vit kunnu fáa allan tann blokk vit vilja, og senda hann retur til Danmark, men gevur hettar okkum meiri sjálvstýrið?

Um vit skulu tryggja okkum soleiðis, at danska stjórnin ikki kann fara inn, og taka av alla deligatión av teimum málum, vit hava yvirtikið, so má antin grundlógin broytast, ella mugu vit fáa eina grundlóg fyri Føroyar.

Fyrst tá hettar er hent, kunnu vit byrja at tosa um, at stýra í egnum landi.

Fríggjamorgunin h. 2. mars áleið kl. 08.15

Jenis av Rana,
løgtingsmaður fyri Miðflokkin

Miðfloksins, sum sjónvarpið hevði greitt frá kvøldið fyri, uppskotið um hjálp til teirra, ið mistu sethús síni í kreppuárunum, og sum enn sita eftir við skuld uttan nakra tilsvarandi ogn.

Hesin var ikki fyrsti, ið ringdi í hesum sambandi, heldur ikki hin seinasti. Runt um úr oyggjunum, úr Danmørk og úr Noregi hava tey ringt fyri at spyrja, um ikki -og nær- myndugleikanir fara at veita sjálvsøgdu hjálpina, nær túrur teirra verður í røðini (aftaná bankar, vinnulív og tey við stóru bankabókunum).

12 tímar seinni

Sama kvøldið, áleið kl. 20.14 fingu hesi eina fornemma heilsan. Via sjónvarpsstudio fingu tey at vita, at tey onga hjálp kunnu vænta, tí tey "vil ikke betale". Stutt og greið heilsan frá ***øðrum stjóranum úr tí banka, sum hesi, saman við øllum øðrum føroyingum, fyri fáum árum síðani guldu til og bjargaðu við milliarda krónutali.***

Evangeliið eftir matteus kap. 18, ørindi 23- og fram.

Hví omanfyrinevnda bílbiubrot rann mær í huga, kann hvør einstakur lesari meta um , men tað sigur frá Triði, ið ringdi í viðtaluna hendan kalda vetrarmorgun, var ikki sjúkur, hann ringdi at takka fyri uppskotið ***áleið kr. 42 millión í okkara pengum****, siga bíbliukønir), førdur fram fyri hann. Og við tað at hann einki átti at rinda við, beyð harri hansara, at hann og kona og børn hansara og alt, ið hann átti, skuldi seljast, og at rindast skuldi. Tá fall tænarin niður fyri honum, bønaði hann og sagði: "Harri, hav tol við mær, so skal eg gjalda tær tað alt!" Tá tykti Harranum hjá hesum tænara hjartaliga synd í honum, hann gav hann leysan og gav honum skuldina eftir. Men táið hesin sami tænarin fór út, hitti hann ein samtænara sín, sum skyldaði honum 100 denarar (áleið kr. 65 í okkara pengum, siga bíbliukønir). Hann legði tá hond á hann, tók um kvørkrar hansara og segði:" rinda tað, ið tú skyldar!" Tá fall hesin samtænari hansrar niður fyri honum, bað hann og segði:" Hav tol við mær, so skal eg gjalda tær!" Men hann vildi ikki, men fór og læt hann seta fastan, inntil hann rindaði tað, sum hann skyldaði.*

Ein av uppgávum Miðfloksins!

Eg eri samdur við løgtingmanni, sum metti atferð bankastjórans sum eina greiða ábending um, at Miðflokkurin er á rættari kós! Frá stovnan hava vit ført fram og lovað at ***verða á varðhaldi*** og ***at vera verja teirra veiku.*** Hóast í andstøðu meta vit okkum at hava røkt lovaðu uppgávuna. Úr rúgvuni kunnu vit sum dømi nevna, tá vit kapping við privatar flutningsfyritøkur. Hetta er gjørt við almennum pengum og hevur gjøgnum farin ár koppað mongum privatum flutningsfelagi.

Føroya Tele

Næsta dømið er Føroya Tele. Teir hava sum Telefonverk Føroya Løgtings, við almennum peningi, lagt káplar úr Tjørnuvík til Akraberg. Nú er so vent í holuni og fyritøkan er "privatiserað" til eitt alment partafelag. Sjálvandi fáa teir allar káplarnar og bygningar, sum vit skattgjaldarar hava goldið, fluttar til ogn hjá "partafelagnum".

Beinanvegin monopolið var avtikið, komu onnur feløg og bjóðaðu tænastur á teleøkinum. Trupuleikin er bara at feløg í kapping við almenna Føroya Tele máa gjalda FT fyri at samskifta umvegis kaðalnetið hjá Føroya Tele (les Føroya Fólki).

Hetta svarar til at Strandferðslan fær allar vegirnar forerandi, og so bjóðar øllum flutningsfeløgum at kappast "í fríðari kapping" - bara tey fyrst gjalda fyri at koyra á vegunum hjá Strandferðsluni.

Atlantic Airways

Triðja dømið um landsstýrisins vinnulívs stuðul er Atlantsflog. Her er Landsstýrið eigari av fyritøkuni og við almennum (les Før-oya Fólks) pengum í kapping við privat vinnulív. Atlantsflog rekur tyrlutænastuna fyri Landstýrið, og sleppur mærvitandi at behalda møguligt yvirskot av hesari flúgving. Eg veit ikki neyvt hvussu hetta verður avroknað, men eg havi m.a. sjálvur verið við tyrluni ein túr uppi í Gásadali við einum køluskápi. Hetta var eykatúrur sum ivaleyst verður goldin av landskassanum. Hent at hava landskassan sum kunda og eigara, og so sleppa sjálvur at avgera nær tað er neyðugt við einum eykatúri.

Feskasta dømið um almennan vinnustuðul til Atlantsflog er uppskotið sum Jørgen Niclasen (fólkaflokkurin) fekk ígjøgnum herfyri. Har fekk Atlantsflog ein blanko kekk frá landstýrinum til keyp og rakstur av einari nýggjari tyrlu í 10 ár. Avtalan er m.a. soleiðis skrúva saman, at Atlantsflog skal ikki hava hall av hesi tyrluni, og skuldi tað hent at yvirskot var, ja so sleppur Atlantsflog at behalda helvtina av hesum. Tað sum eg vænti fer at henda, er at Magni Arge fær budgetterað hegnisliga, soleiðis at landstýrið flytir Atlantsflog t.d. 15 milliónir til rakstur av nýggju tyrluni næsta ár. Tá so árið er liðugt, og tyrlan kanska hevur flogið nakrar eykatúrar við farmi fyri verandi tyrlu (køliskáp til Gásadal, máling til Koltur o.s.v.), ja so kemur Magni Arge í bløðini við stórtíðindum, at seinasta ár høvdu vit 4 milliónir í avlopi av nýggju tyrluni, og Atlantsflog kann bera landskassanum 2 milliónir aftur - Føroya fólk hevur tá tíverri fingu broytt lóg, sum vildi givið djóralæknum ótarnað loyvi til genmanipulatión, at royndirnar at førða okkum inn í ES eru vorðnar alment kendar, og at í løtuni verður kannað, um ætlanin er, at eisini føroyingar, saman við grønlendingum, verða fyrstu offrini, um stríð skuldi brostið á millum stórveldini. Og at umboðsmaðurin loksins, eftir 20 ára tos, verður veruleiki, eigur flokkurin æruna fyri.

At so ein bankastjóri ikki skilir "Jenus af Rana og dem i Midflokken"- ja, tað kunnu vit saktans liva við.

Anfinn Kallsberg og almennur/kommunalur vinnustuðul

Theodor Joensen

Eg mundi dottið úr stólinum týskvøldið av nøkrum úttalilsum hjá Føroya Løgmanni.

Hann hevur fingið ilt í búkin av einum vinnuframa grunni hjá nøkrum kommunum í norðstreymi. Hann segði at tað almenna skal ikki taka skatt frá borgarunum til at seta í vinnulívið. Hetta kann ljóða ógvuliga skilagott, men um vit hyggja at nøkrum konkretum avgerðum hjá sitandi landstýri, og fyrrverandi landstýrum eisini, sæðst at her er ikki samanhang millum úttalilsini hjá Løgmanni og førdan politikk.

Kommunalur vinnustuðul

Eg vil nevna eitt dømi um vælvirkandi kommunalan vinnulívs stuðul. Runavíkar Kommuna hevur við stórum hegni skapt vinnulívinum í kommununi framúr góðar karmar at virka undir. Kommunan hevur stuðla við at byggja bygningar og havnir sum vinnuvirkir kunnu húsast í. Harvið hevur kommunan brúkt skattgjaldarans pening til vinnulív, og eg vænti at borgararnir í kommununi hava notið, og framvegis fara at njóta, gott av hesum mong ár fram, av tí fjølbroytta virksemi sum av hesi orsøk heldur til í kommununi.

Landsins vinnustuðul

Hyggja vit haraftur ímóti at landstýrisins dispositiónum á stuðulsøkinum, ja so fer av álvara at leka millum teori og praksis hjá løgmanni. Eg vil nevna nøkur fá dømi, og samstundis heita á føroya journalistar at taka táttin upp og grava meiri í hesum viðurskiftum.

Strandferðslan

Taka vit fyrst strandferðsluna, ella rættari Farmaleiðir, er tað almenn vitan, at farmaleiðir í áravís hevur dumpa flutningsprísir í kapping við smáar flutningsfeløgum, sum skuldi halda roknskap við tænarar sínar, og:

.....tá hann fór at gera upp, var ein, ið skyldaði honum 10.000 talentir (ara sín, sum skyldaði

Hetta er gjørt við almennum pengum og hevur gjøgnum farin ár koppað mongum privatum flutningsfelagi.

Føroya Tele

Næsta dømið er Føroya Tele. Teir hava sum Telefonverk Føroya Løgtings, við almennum peningi, lagt káplar úr Tjørnuvík til Akraberg. Nú er so vent í holuni og fyritøkan er "privatiserað" til eitt alment partafelag. Sjálvandi fáa teir allar káplarnar og bygningar, sum vit skattgjaldarar hava goldið, fluttar til ogn hjá "partafelagnum".

Beinanvegin monopolið var avtikið, komu onnur feløg og bjóðaðu tænastur á teleøkinum. Trupuleikin er bara at feløg í kapping við almenna Føroya Tele máa gjalda FT fyri at samskifta umvegis kaðalnetið hjá Føroya Tele (les Føroya Fólki).

Hetta svarar til at Strandferðslan fær allar vegirnar forerandi, og so bjóðar øllum flutningsfeløgum at kappast "í fríðari kapping" - bara tey fyrst gjalda fyri at koyra á vegunum hjá Strandferðsluni.

Atlantic Airways

Triðja dømið um landsstýrisins vinnulívs stuðul er Atlantsflog. Her er Landsstýrið eigari av fyritøkuni og við almennum (les Før-oya Fólks) pengum í kapping við privat vinnulív. Atlantsflog rekur tyrlutænastuna fyri Landstýrið, og sleppur mærvitandi at behalda møguligt yvirskot av hesari flúgving. Eg veit ikki neyvt hvussu hetta verður avroknað, men eg havi m.a. sjálvur verið við tyrluni ein túr uppi í Gásadali við einum køluskápi. Hetta var eykatúrur sum ivaleyst verður goldin av landskassanum. Hent at hava landskassan sum kunda og eigara, og so sleppa sjálvur at avgera nær tað er neyðugt við einum eykatúri.

Feskasta dømið um almennan vinnustuðul til Atlantsflog er uppskotið sum Jørgen Niclasen (fólkaflokkurin) fekk ígjøgnum herfyri. Har fekk Atlantsflog ein blanko kekk frá landstýrinum til keyp og rakstur av einari nýggjari tyrlu í 10 ár. Avtalan er m.a. soleiðis skrúva saman, at Atlantsflog skal ikki hava hall av hesi tyrluni, og skuldi tað hent at yvirskot var, ja so sleppur Atlantsflog at behalda helvtina av hesum. Tað sum eg vænti fer at henda, er at Magni Arge fær budgetterað hegnisliga, soleiðis at landstýrið flytir Atlantsflog t.d. 15 milliónir til rakstur av nýggju tyrluni næsta ár. Tá so árið er liðugt, og tyrlan kanska hevur flogið nakrar eykatúrar við farmi fyri verandi tyrlu (køliskáp til Gásadal, máling til Koltur o.s.v.), ja so kemur Magni Arge í bløðini við stórtíðindum, at seinasta ár høvdu vit 4 milliónir í avlopi av nýggju tyrluni, og Atlantsflog kann bera landskassanum 2 milliónir aftur - Føroya fólk hevur tá tíverri langtsíðani gloymt at landskassin hevur goldið hesar pengarnar út áðrenn, so tað sum veruliga er hent, er at Atlantsflog hevur fingið eina gávu uppá 2 milliónir - livst so spyrst.

Morala

Fá landskassan burtur frá øllum vinnulívs íblandingum, og lat kommunurnar, undir skipaðum viðurskiftum, seta sínar vinnuframagrunnar á stovn. Tað kann t.d. við lóg avmarkast, hvussu stóran part hesir vinnuframagrunnar í mesta lagi kunnu eiga í einum felag. Hesir vinnuframagrunnar kunnu gera tað møguligt við meiri fjølbroyttum vinnulívi í lokalumhvørvinum, til gagn fyri nærumhvørvið og alt landið.

Føroya journalistar: Havi høvdið við til arbeiðis og fylgið við hvat hendir í samfelagnum. Latið ikki politikarar sleppa avstað við einumhvørjum úttalilsi uttan mótspæl.